

*Víkingar leita aftur til Føroya!*
Mynd: Jens Kristian Vang

# Anastasis heilsar føroyingum

**Eini 150 fólk vóru mikudagin komin saman at taka ímóti Anastasis á Sundi. Bøn, tónleikur og løgmaður vóru á skránni**

ANASTASIS VITJAR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Stutt eftir klokkan trý seinnapartin mikudagin legði stásiliga sjúkrahússkipið, Anastasis, at á keiini á Sundi. Eini 150 fólk vóru komin saman at taka ímóti skipinum, ið fyrst og fremst virkar fyri at veita teimum neyðstøddu í Afriku vón og grøðing.

Nógv varð lagt fyri at gera móttøkuna av Anastasis so hugnaliga sum gjørligt. Á keiini veitraðu fólk við føroyskum fløggum, og fleiri høvdu latið seg í føroyska búnan til høvið. Tá skipið hevði lagt at, varð eisini skotið við fýrverki.

Anastasis steðgar á í Føroyum í eina viku, har møguleiki verður hjá føroyingum at síggja virksemið umborð á sjúkrahússkipinum.



*Jóannes Eidesgaard, løgmaður, beyð Anastasis vælkomin*
Mynd: Jens Kristian Vang



*Syngjandi móttøka á Sundi*
Mynd: Jens Kristian Vang

### Føroyingar umborð

Anastasis er 12.000 tons til støddar, og manningin telir góð 400 fólk úr 30 ymiskum londum. Við á ferðini til Føroya var eitt føroyskt par. Debbie og Jonhard Joensen við børnunum Rebekku og Stefan hava seinastu mánaðirnar virkað umborð.

Á keiini á Sundi taldust eisini aðrir føroyingar, ið áður hava verið umborð á skipinum

### Tónleikur og bøn

Undir móttøkuni mikudagin ljómaði eisini tónleikur til heiðurs fyri manningini á Anastasis. Eirikur við Skála og Holgar Johannesen løgdu fyri, og seinni var kórtónleikurin at hoyra. Kórið var sett saman úr fleiri samkomum, sum Sigrid Sivertsen hevur staðið fyri.

Á móttøkuni var eisini bøn á skránni. Feðgarnir, Jóni og Jóan Petur Johannesen hildu eina bøn í felag.

### Løgmaður takkaði

Løgmaður, Jóannes Eidesgaard, hevði eisini leitað sær til móttøkuna hjá Anastasis mikudagin. Í røðu síni til manningina á Anastasis vísti løgmaður á alstóra tørvin fyri hjálpararbeiði kring heimin.

Løgmaður greiddi frá, at





gjógvin millum rík og fátøk í heiminum í dag er alt ov stór, og vit liva í einum krígsherjaður heimi, har sjálvboðið hjálpararbeiði er ein kyndil í myrkinum.

Hann nýtti eisini høvið til at takka manningini, ið hevur valt at halga sítt til hjálpararbeiði.



*Hesar báðar litføgrugentur tóku ímóti Anastasis*
Mynd: Jens Kristian Vang

